# Reading-spælari til Chelsea

Steve Sidwell hevur leingi verið settur í samband við Chelsea. Í kvøld bleiv tað so almannakunngjørt, at Reading-leikarin hevur skrivað sáttmála við London-felagið. Sidwell hevur sum ungur leikt í Arsenal, men fekk ongantíð veruliga gjøgnumbrotið. Gjøgnumbrotið fekk hann tó í ár, tá ið hann meistarliga hevur verið drívmegin á miðvøllinum hjá Reading. 24 ára gamli Steve Sidwell valdi Chelsea framum Aston Villa og Newcastle.



# Símun skoraði í tapi

Keflavík verður roknað sum eitt av liðunum, sum í hesum kappingarárinum møguliga kann gera nakað við FH, ið er fleirfaldur íslendskur meistari í fótbólti.

Í 2. umfari um vikuskiftinum vitjaði FH í Keflavík, og meistararnir fóru stuttu leiðina til hús aftur við øllum stigunum. FH vann 2-1, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið málleysur javnleikur. Símun Samuelsen var á miðvallarplássinum í vinstru hjá Keflavík, og eftir fáum sekundum varð hann jarðlagdur í gjøgnumbrotsroynd. Tíggju minuttir eftir steðgin legði FH seg framum, men átta minuttir seinni javnaði Keflavík. Málskjútti var Símun Samuelsen, sum eitt sindur til vinstru í brotsteiginum fekk bóltin og sendi hann í høgra málhorn. Tíggju minuttir undan leikloki skoraði FH sigursmálið.

*Tað hava altíð verið spælarar, sum hava nýtt allar midlar, fyri at traðka á mótstøðuna*

*Vit eru snøgt sagt ikki nóg góð til at taka ímóti teimum, sum eru eitt sindur øðrvísi enn vit*

# Atburðurin skal søma seg

**Stevnan hjá FSF er púrasta greið. Brot á stevnuna skal revsast. Og tað kann revsast heilt har, staðfestir formaðurin í Kappingarnevndini**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Karl Vidtfeldt, formaður í Kappingarnevndini hjá FSF, sigur, at trupulleikin við rasismu avgjørt er nakað, sum verður tikin í fullum álvara av Fótbóltssambandinum.

- Eftir tann tilburðin, sum var frammi í fjør heyst, høvdu feløgini fund, har eisini hetta mál var á skránni. Øll vóru á einum máli um, at støðan hjá FSF í hesum skuldi vera púrasta greið, og ein staðfesting frá FSF-forsetanum varð eisini send út eftir fundin.

- Síðani er málið tikin upp á formans- og dómarafundum, eins og tað er tikið við í stevnuna hjá FSF. Ein stevna, sum eisini varð gjøgnumgingin, tá fundurin "felags stev" var við feløg, venjarar og dómarar fyri stuttum.

Hóast Karl ikki vil gera viðmerkingar til ítøkilig mál, sum hava verið frammi, so er hann púrasta avgjørdur um, at farast skal hart fram móti hesum fyribrigdinum.

- Sum partur av stevnuni er hetta nakað, sum øll innan fótbóltin eiga at taka atlit til. Feløgini hava eisini bundið seg at fylgja stevnuni, og tí eiga feløgini heilt klárt at hava sínar egnu mannagongdir á økinum. Og ikki bara fyri fremstu liðini.

Kunnu vit ímynda okkum eina støðu, har felag verður revsað ella átalað av FSF, tí stevnan ikki verður fylgd.

- Sjálvandi ber tað til. Og vit hava havt støður, har átalur eru givnar, sigur Karl.

- Men brot á stevnuna skulu sektast. Vit hava hugt at, hvussu grannalond okkara gera í slíkum førum, og tað eru hesum reglum, sum vit fylgja. Hvørt mál verður viðgjørt fyri seg, og tí ber als ikki til at siga, at vit nú hava lagt eina siðvenju við einum degi í dystarbanni, um rasistisk orð verða nýtt á ella uttan fyri vøllin. Vit hava givið upp til fýra daga leikbann fyri brot á stevnuna, uttan at hetta tó hevur havt við rasismu at gera. Og verður groft brot framt, kann hetta væl viðføra eina enn harðari revsing. Og tá meini eg við atburð sum heild. Tað verða nógvar ófínar metodur – har ímillum rasisma - nýttar á vøllinum, og tað snýr seg um at koma hesum til lívs. sigur Karl Vidtfeldt.



*FS Vágar hevur eisini fremmandar spælarar. Og hesir eru at kalla hvønn tann einasta dyst offur fyri rasistiskum atburði frá mótspælarum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

gerast. Og hetta skal fyrst og fremst gerast á vøllinum.

- Tað hjálpir einki, at lasta áskoðarum fyri teirra atburð. Eg eri avgjørdur um, at tað fyrst og fremst eru spælararnir, sum ávirka áskoðararnar – ikki øvugt. Eg havi so ongan tíð upplivað, at ein dystur, sum verður spældir í góðum ítróttaranda, fær áskoðararnar at rópa ókvæmisorð. Í so máta kanst tú siga, at rópini uttan fyri vøllin endurspegla tað, sum gongur fyri seg inni á vøllinum.

- Tí eiga vit frá øllum síðum at senda greið signal um, at hetta verður ikki góðtikið. Og tá tosið eg um venjarar, spælarar, feløg, dómarar og FSF.

- Eitt felag eigur ikki at góðtaka, at ein av teirra spælarum ella venjarum sýnir slíkan atburð. Og tað vildi verið upp á sítt pláss, um øll feløg gjørdu innan hýsis reglur hesum viðvíkjandi. Til dømis við at geva innanhýsis leikbann.

- Og hóast dómararnir siga seg vilja revsa slíkan atburð, so havi eg ikki sæð tað hent enn. Sjálvandi hoyra teir ikki alt, men tað er í heilum, at menn fáa kort, tá teir gremja seg um eitt fríspark ella líknandi. So eg rokni við, at dómarin eisini hoyrir mangt av tí, sum verður rópt millum spælarar.

- Og at enda haldi eg, at hamarin eigur at fella hart, tá slíkur atburður skal revsast. Slært tú ein spælara, so er bannið kanska tríggir dagar. So ber ikki til, at tú sleppur við einum degi fyri at niðurgera við orðum. Tá kanst tú eins væl fara at spekulera í hesum, tí tá er tað kanska royndina vert, um úrslitið verður, at mótspælarin yvirreagerar.

### Ein samfelags-trupulleiki

Hóast tað júst her og nú er rasisman á vøllinu, sum er í størsta fokus á vøllinum, so halda ter báðir ikki ikki, at hetta er einasti staðið, sum trupulleikin er. Og hann heldur heldur ikki, at rasisman er einasti trupulleikin.

- Vit bera ótta fyri, at hetta er eitt keðiligt rák, sum er í føroyska samfelagnum. Vit eru snøgt sagt ikki nóg góð til at taka ímóti teimum, sum eru eitt sindur øðrvísi enn vit. Her og nú verður tosað um rasismu. Eina aðru ferð er tað kanska onkur átrúnaðarligur bólkur, ella kanska tey samkyntu.

- Í fótbóltinum er tó eitt stórt fokus frá fjølmiðlunum, og tí verða trupulleikarnir kanska betri eksponeraðir her. Og tí er ábyrgdin eisini eyka stór hjá fótbóltinum. Tað, sum hendir á vøllinum, hevur stóra ávirkan á nógv fólk, og tí er tað okkara skylda, at vit bera okkum sømiliga at, siga teir báðir at enda.